

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 11 - 2011

# Norra bjóðar til nýggja oljuleiting

Norski oljumálaráðharrin, Ola Borten Moe hevur boðið oljufeløgum at nominera øki, sum myndugleikarnir so skulu raðfesta til komandi 22. útbjóðingina á norska landgrunninum. Økini, sum ætlandi verða boðin út, fevna serstakliga um sokallað frontier tvs. útjaðaraøki, har mett verður, at møguleiki er at gera stór olju- ella gassfund. Eg haldi tað er av týdningi at varðveita áhugan fyri virksemi á øllum oljuumráðum. Og her hevur tað alstóran týdning at halda fram við leitivirkseminum við at bjóða nýggj øki út, sigur oljuráðharrin. Sjálvur heldur hann, at oljufeløg eru serliga áhugað í at leita í frontierøkjunum í Norskahavinum og í Barentshavinum. Økini, sum oljufeløgini fara at vísa á, hava stóran týdning fyri myndugleikarnar, tí tey eru ein stór hjálp hjá myndugleikunum til tess at finna røttu økini at bjóða endaliga út. Útbjóðingin verður kunngjørd áðrenn summarið 2012 og verða loyvini latin á vári 2013. Norra er annars tað landið í heiminum, sum liggur á odda, tá talan er um oljuleiting í ár og har oljufeløg eisini hava havt mest eydnu við sínum íløgum. Fleiri av oljufeløgunum, sum eru virkin í Føroyum, fara helst eisini at finnast millum feløgini, ið fara at søkja í næstu norsku útbjóðingini. Mynd - Norski oljumálaráðharrin Ola Borten Moe

[redacted]